## Boys in a band í Vestmanna

Ungdómshúsið »Staðið« í Vestmanna skipar fyri konsert við GBOB vinnarunum »Boys In a Band« fríggjakvøldið 15. februar. »Boys In a Band« vunnu heiðurin sum »Heimsins besti nýggi bólkur« í Camden Electric Ballroom í London í desember. Hesin heiður kann gerast eitt startskot hjá bólkinum til at fáa altjóða gjøgnumbrot. Konsertin hjá »Boys In a Band« í Vestmanna byrjar kl. 21.



## Ósemja um rækjukvotu

Grønlendski andstøðuflokkurin Inuit Ataqatigiit er sera misnøgdur við, at landsstýrið hevur gjørt av at skerja rækjukvotuna fimm prosent. Kupik Kleist, sum er formaður í IA, sigur við KNR, at fimm prosent er nógv minni, enn fiskifrøðingarnir hava mælt til. Grønlendsku fiskifrøðingarnir siga, at rækjustovnurin er so illa fyri, at teir mæla til at skerja kvotuna 30 prosent. Kupik Kleist vil hava landsstýrið at lurta eftir tilmælinum.

# ...gar bygdu fiskavirkið





*Her er Fríðhild í holt við at kopiera myndir, sum verða sýndar mánadagin, tá ið virkið fer at halda sín 40 ára stovningardag*

*Mynd: Gunnleif Bjartalíð*



*- Vit noyðast at ásanna, at okkum vantar fólk fyri at halda fiskavirkisvinnuni uppi. Vit hava havt útlendingar á virkinum í Skopun, og eg haldi, at hesi eru stak røsk og fyrikomandi fólk, sigur Fríðhild Winther*

*Mynd: Gunnleif Bjartalíð*

is, at alt bygdarfólkið átti virkið. Høvdarhagi var felags fyri allar skopuningar. Her kundi hvørt húski hava kúgv ella seyð gangandi, og í aðrar mátar fingu fólk seyð bíliga úr haganum, tá ið skurðfjøllini vórðu gingin. Hevði tú stórt hús, fekst tú ein seyð bíliga – og var talan um tvey eldri fólk í húsi, fingu tey kanska ein hálvan seyð bíliga.

Hon sigur, at henni kunnugt, var tað avlopið av rakstrinum av Høvdahaga, sum gjørdist fyrsta íkastið til fiskavirkið í bygdini, og seinni komu so bæði arbeiðsmannafelagið í bygdini og kommunan upp í.

- Tað var tí fólkið í Skopun, sum átti virkið, endurtekur hon.

### Avmarkað tal

Fríðhild sigur, at í byrjanini var tað soleiðis, at bert ein úr hvørjum húsi í bygdini slapp at arbeiða á virkinum, og hetta varð gjørt fyri, at inntøkurnar av hesum arbeiði skuldu fella so rættvíst í bygdini sum gjørligt.

- Tað var jú avmarkað, hvussu nógvum fólki brúk var fyri í byrjanini, men sum tíðin leið, og maskinur komu inn á virkið, arbeiddu fólk úr øðrum bygdum í Sandoynni eisini í Skopun.

Hon minnist væl tíðina í sjeytiárunum, tá ið bilur kom við fólki av Sandi og øðrum bygdum í oynni norður til Skopunar at arbeiða á seinnapartsvakt – og síðan kom eftir teimum aftur, tá ið vaktin var lokin seint um kvøldið.

- Vit vóru eisini nøkur úr Skopun, sum arbeiddu á seinnapartsvaktini. Eg hevði børn og arbeiddi sjálv nógv um kvøldarnar. Heima hevði eg fastar skúlagentur at ansa børnunum fyri eitt oyra. Eftir fiskaframleiðslan var liðug á virkinum seint á kvøldið, vaskaði eg mangan til klokkan 01 um næturnar. Tað var ikki soleiðis, at avbygdarfólkið neyðturviliga skuldu arbeiða á kvøldvaktini. Tey kundu velja, um tey heldur vildu arbeiða um dagin, men eg haldi, at teimum dámdu sera væl hesa skipan, meðan hon var soleiðis. Hetta var ein ógvuliga góð tíð.

### Gott arbeiðspláss

Fríðhild hevur verið knýtt at fiskavirkinum í Skopun at kalla øll árini, síðan hon var eini 14 ára gomul og byrjaði at arbeiða í summarfrítíðini.

- Fyrst í nítiárunum, tá ið alt samfelagið steðgaði upp, steðgaði eisini fiskaframleiðslan í Skopun, og virkið læt aftur í eina tíð. Annars hevur tað verið opið øll árini síðan byrjan.

Hon heldur, at tað var ógvuliga gott fyri bygdina, at Sandoy Seafood, sum tíðin leið, tók um endan og hevur havt virkið opið síðan.

- Í mong ár var lítil útskifting millum tey, sum skipaði fyri í Skopun, og kendu andlitini gingu aftur gjøgnum nógv ár. Hóast eigaraviðurskiftini eru broytt, hevur heldur ikki so stór útskifting verið seinnu árini. Hetta eru øll fitt og dugnalig fólk, og enn sum áður er fiskavirkið í Skopun eitt gott og gevandi arbeiðspláss, sum framvegis hevur stóran týdning fyri Skopun og aðrar bygdir í oynni.

### Færri skip

Fríðhild ivast onga løtu í, at fiskavirkið í Skopun saman við útróðrarbátum og skipum, sum hava verið knýtt at bygdini, hevur verið grundarsteinurin undir bygdini.

- Her vóru nógvir útróðrarbátar og nógvur útróður, tá ið virkið læt upp og nógv ár frameftir. Seinni fingu vit eisini størri deksfør, línu-og trolbátar og at enda trolarar. Í dag er flotin, sum hoyrir til bygdina lítil, men virkið keypir fisk frá skipum, sum eru heimahoyrandi aðrastaðni.

Vit spurdu eisini Fríðhild, hvat hon heldur um kjakið um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum.

- Eg haldi, vit noyðast at ásanna, at okkum vantar fólk fyri at halda fiskavirkisvinnuni uppi. Vit hava havt útlendingar á virkinum í Skopun, og eg haldi, at hesi eru stak røsk og fyrikomandi fólk. Flestu ungdómar fara at læra, og tað haldi eg vera skilagott. Hinvegin síggja vit nógv av hesum ungu, sum koma á virki í eina tíð at tjena sær til lesnaðin. Vit hava eisini fólk á virkinum, ið hava onkra útbúgving, sum tey ikki kunnu brúka í Sandoynni, tí einki arbeiði er júst til teirra.

### Mergjað fólk

Fríðhild heldur nógv um sínar bygdarmenn, sum í sínari tíð slóðaðu fyri.

- Eg haldi, at tað var so flott av teimum, sum undan fóru, at tey megnaðu at reisa hetta virkið á føtur. Tað hava verið mergjaði fólk, ið her settu búgv, og ættarliðini hava lyft arvin eftir tey, sum undan fóru.

Hon vísir á, at Skopun gekk á odda við fyrstu dansistovuni, bygdarvegnum – og longu tíðliga I 1920-unum fekk bygdin havnalag.

- Tað var eisini í Skopun, at fyrsta føroyska gudstænastan varð hildin í kirkjuni, sigur Fríðhild Winther í samrøðu við Sosialin, nú fiskavirkið í bygdini hevur 40 ár á baki sunnudagin.

Í dag arbeiða eini 70 fólk á Sandoy Seafood í Skopun, og virkisleiðari er Martin Olsen. Góðskuleiðari er Gunnleif Bjartalíð.

Móttøkan á virkinum mánadagin verður millum klokkan 14 og 18, tá ið øll eru vælkomin inn á gólvið til drekkamunn og køku.